


***Nr. 1*** ***5. januar 2020*** ***80. árg.***

# Sannleikin setir í frælsi

*Skrivað stendur: „Náðin og sannleikin komu við Jesusi Kristi.“ (Jóh. 1,17). Víðari stendur: „Sannleikin skal fría tykkum.“ (Jóh. 8,32).*

Náðin fríar okkum ikki, tað er tað sannleikin, sum ger, og hetta síggja vit týðiliga í frásøgnini um samariukonuna, sum Jesus hitti við Sikars brunn. Tey koma í prát, og Jesus sigur við hana: „Far avstað og rópa mann tín, og kom higar!“ (Jóh. 4,16) Konan svaraði: „Eg havi ongan mann.“ Hon heldur seg til sannleikan og sigur: „Eg havi ongan mann.“ Tá avdúkar Jesus hana og sigur: „Rætt segði tú: eg havi ongan mann; tí at tú hevur havt fimm menn, og tann, sum tú nú hevur, er ikki maður tín. Hetta hevur tú sagt satt.“

Vit skuldu kanska hildið, at hon gjørdist firtin, tá ið hann avdúkaði hana. Men nei, hon er sett í fullkomið frælsi. Hon, sum fór eftir vatni í heitastu tíð, tí hon ikki vildi møta nøkrum – helst tí, at fólk høvdu háðað og niðurgjørt hana vegna hennara lívsførslu – fer nú inn í bygdina og fer at tosa við sítt bygdarfólk og sigur, at hon hevur sæð ein mann, sum helst er Kristus. Av hennara vitnisburði fór bygdarfólkið út til brunnin at hitta Jesus, og Jesus talaði til teirra, og mong komu til trúgv á hann. Tey bóðu hann steðga, og hann var har í tveir dagar, og tá komu enn fleiri til trúgv, og tey vitnaðu beinanvegin, tí tey fóru til konuna og søgdu: „Vit trúgva nú ikki longur fyri talu tína; tí at sjálvir hava vit hoyrt, og vit vita, at hesin av sonnum er frelsari heimsins.“

Konan, sum hevði skýggjað bygdarfólkið, fer nú við stórum frímóði at vitna fyri teimum. Sannleikin hevur sett hana í fullkomið frælsi. Vitnisburður hennara var stuttur, men hevði stóra ávirkan. Tað man hava verið undarligt hjá Jesusi, at gleðin gerst so stór hjá einum fremmandum fólki, meðan hansara egnu ikki tóku ímóti honum.

*Effie Campbell.*

# Maðurin, sum ongantíð hevði syndað

Fólkakirkjupresturin, Trond Løberg, talaði á summarstevnuni hjá Oase í Noregi. Har segði hann millum annað:

„Tveir menn sótu inni á einari matstovu. Teir komu í gott prát. Annar teirra var evangelistur. Best sum er, fellur talan niður á orðið „syndari". „Ja, eg eri so eingin syndari," helt hin fyri. „Eg skikki mær væl og eri hampiligur upp á allar mátar."

„Veitst tú hvat," segði evangelisturin, „eg fái hug at lesa eitt lítið petti fyri tær. Tað stendur í „Kærleikans hásongi". Tú manst hava hoyrt tað, tá ið tú giftist. Tað stendur í 1. Kor. 13,4-7. Eg lesi tað soleiðis, at hvørja ferð orðið kærleiki stendur, so kann eg seta mítt navn staðin fyri, ella eg kann seta orðið „eg" inn har."

„Eg eri langmóðigur, eg eri góðviljaður. Eg øvundi ikki. Eg eri ikki stórorðaður. Eg blæsi meg ikki upp. Eg havi ikki ósømiligan atburð. Eg søki ikki mítt egna. Eg ilskist ikki. Eg eri ikki illmintur. Eg gleðist ikki yvir órættvísini; men eg gleðist saman við sannleikanum. Eg toli alt. Eg trúgvi øllum. Eg vóni alt. Eg beri alt."

„Hevur tú hildið alt hetta?" spurdi evangelisturin. Hin sat bara og gapaði. „Hatta las prestur fyri tær, tá ið tú giftist." So vísti tað seg, at hann als ikki var giftur, men bara livdi saman við konuni, og hann visti ikki, at ótukt (ólevnaður) var ein synd, tí hann hevði helst ongantíð lisið í Bíbliuni. (2. Kor. 12,21 & Gal. 5,19).

„Veitst tú, góði, hvørt einasta menniskja, sum hevur livað á hesi jørð, hevur verið ein syndari. Men Gud sendi Jesus í okkara stað. Hann hevur betalt fyri allar heimsins syndir. Tann, sum bjóðar Jesusi inn í hjarta sítt sum **Harra og Frelsara** og biður um fyrigeving, fær syndafyrigevingina til ognar, sum

eina gávu, og Gud sær okkum hvít og rein vegna tað, sum Jesus hevur gjørt. Vit synda hvønn dag, og tí er neyðugt, at vit dagliga biðja um fyrigeving. Tað hevur Jesus lært okkum, tá ið hann lærdi okkum okkara dagligu bøn, „Faðirvár“: Fyrigev okkum syndir okkara, so sum vit eisini fyrigeva teimum, móti okkum synda.“

„Tí at tvær ringar gerðir hevur fólk mítt gjørt: Meg, lindina við tí livandi vatni, søgdu teir burtur og høgdu sær brunnar við sprungum, ið ikki halda vatni.“ Jer. 2,13.

*Effie Campbell.*

# Frá deyðastrái til brúsandi lív

Eini hjún vóru gestir á Kanal 10. Konan, ið æt Edith, segði frá eini serligari tíð í lívi sínum.

„Eg gjørdist sjúk og versnaði skjótt. Eg bleiv gul um allan kroppin, eisini inni í eygunum og hevði ein ótolandi skriða. Eg varð innløgd á tvey ymisk sjúkrahús, og í báðum støðum tóku tey eina rúgvu av blóðroyndum, og eg var í øllum hesum ymisku maskinunum. Men teir kundu ikki finna útav, hvat ið bagdi mær, og eg varð send til hús. Eg var komin til deyðis, og vit tosaðu um jarðarferð mína, og hvussu tað ymiska skuldi skipast fyri.

Men so kom maður mín inn í kamarið og setti seg á songarstokkin og segði: „Nú lesi eg trý skriftstøð fyri tær:

„Men hann varð særdur vára synda vegna og sundurbrotin vára misgerða vegna; okkum til friðar kom revsingin niður á hann, og **av sárum hans fingu vit heilsubót**.“ Jes. 53,5.

„**Hann tók ilskur várar**, og **sjúkur várar bar hann**.“ Matt. 8,17.

„Hann bar sjálvur syndir okkara á likami sínum upp á træið, fyri at vit, deyðir frá syndunum, skulu liva fyri rættvísini. **Við sár hansara eru tit grøddir**.“ 1. Pæt. 2,24.

Trýrt tú, at Jesus er hin sami í dag og í gjár og til ævigar tíðir?“ – Jú, tí trúði eg, tað er ikki umbroytingarskuggi hjá honum. „Trýrt tú, at Jesus er sannleikin?“ helt hann fram. – Jú, tí trúði eg eisini. Jesus er vegurin, sannleikin og lívið. „Íðan, so má hetta vera satt, at hann hevur tikið tína sjúku.“

Og brádliga slerdi ein vissa seg niður í meg. Eg visti, at eg visti, at eg visti, at Jesus fór at grøða meg. Eg skuldi bara vera

tolin og bíða eftir honum. Tá ið fólk ringdu og spurdu, hvussu eg hevði tað, so svaraði eg, at Jesus fór at grøða meg. Tað ivaðust tey stórliga í, men eg helt fast við mítt.

Eg hevði einki kunnað gjørt. Maður mín mátti gera alt, eisini vaska upp. Men nú noyddi eg meg upp úr songini og royndi at fara at vaska upp. Tað var ein stór avbjóðing fyri meg. Eg megnaði tað, og dagin eftir royndi eg at gera eitt lítið sindur meira, og eg styrknaði dag frá degi. So fekk eg sovorðna orku, at eg vaskaði øll vindeyguni, og nú havi eg meira orku enn maðurin og eri so spilfrísk. Harrin skal hava takk og lov og prís. Hann hevur gjørt eitt stórt undur í mínum lívi. Eg, sum lá á deyðastrái, eri frísk og sterk. Eg vil brúka mína tíð at tæna honum."

*Effie Campbell.*

# Tunglyndi

Um tú vilt uppliva, at tunglyndis mjørkin léttir, skalt tú gevast at hyggja í speglið og heldur fara at hyggja út gjøgnum vindeygað.

Hin viðgitni sálarfrøðingurin Karl Menninger varð einaferð spurdur: „Hvørji ráð vilt tú geva einum persóni, sum hevur tunglyndi og kennir seg mótfalnan?" Hann svaraði: „Læs hurðina aftur eftir tær. Far tvørtur um vegin. Finn onkran, sum hevur ein tørv og ger so okkurt fyri at bøta um ta støðuna."

Tað er so einfalt, kortini gloyma vit tað ofta! Veruleikin er tann, at tá ið tú hjálpir øðrum, so hjálpir tú eisini tær sjálvum.

*e.c.* ums.

**Sunnudagsblaðið**
**ynskir øllum eitt**
**av Harranum**
**signað nýggjár**

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | |
|---|---|---|
| 5. jan. | Tekstur: 2 Mós. 19,1-25 | bíbliuorð: 2 Mós. 19,5 |
| 12. jan. | Tekstur: 1. – 3. boð, 2 Mós. 20,1-11 | bíbliuorð: Mark. 12,30 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74




***Nr. 2*** ***19. januar 2020*** ***80. árg.***

# Ferðamál: Himmalin

*„Eg eri uppreisnin og lívið; tann, sum trýr á meg, skal liva, um hann so doyr.“ Jóhs. 11,25.*

Jesus visti, at ein fyrri páskadagur fór at koma. Longu her sigur hann, at hann er uppreisnin og lívið.

Lívið er ein ferð. Ferðin hevur eina byrjan og ein enda. Vit kundu ikki ávirka byrjanina. Vit kundu ikki velja foreldur, eygnalit ella kyn. Tann dagur kemur eisini, tá ið lívið endar, og heldur ikki har hava vit nakað val. Deyðin kemur til øll. Ferðina millum føðing og deyða kunnu vit ávirka. Vit kunnu gera skilagóð val.

Lívið er ein ferð. Spurningurin er, hvussu tað kann gerast ein góð ferð. Við Guds hjálp kunnu vit fáa eina innihaldsríka ferð við meining í. Ferðin kann viðhvørt vera krevjandi. Vit kunnu gerast sjúk, fáa trupulleikar í sambondum, vera fyri tapi o.s.fr. Men í øllum kunnu vit eisini merkja, at Jesus er við okkum á ferðini.

Ferðamál: Himmalin. Lívið er ein ferð. Guds vegur førir okkum altíð heim. Tá ið eg eri úti og ferðist, gleði eg meg altíð at koma heim. Eg telji dagarnar og hugsi: „Skjótt eri eg heima aftur.“ Bíblian sigur, at verðin er ikki okkara endaliga heim. Vit eru „fremmand og útlendingar á jørðini.“ Hebr. 11,13. Sanna heim okkara er Himmalin – og tað er hagar, Guds vegur leiðir.

Himmalin. Sí Opb. 21,4. Tað má vera ómetaliga framúrskarandi í Himli! Eingin tár. Eingin deyði. Eingin sorg ella grátur ella pína.

Hvussu er Himmalin? Vit fáa ein feril av tí í Opb. 21, vers 11,21. Sí eisini Opb. 21,4.

Himmalin er Guds heim. Tað er har, Gud býr. „Vit skulu altíð vera saman við Harranum.“ 1. Tess. 4,17.

Summi siga, at tað fer at verða keðiligt í Himli. Ja, um vit bara skulu syngja, so verður tað heldur langtligt. Tá ið Gud gjørdi okkara jørð so vakra, hvat hevur Hann so ikki gjørt við heim sítt í Himli?

Allur skapningurin verður settur í frælsi frá forgeingiliga trældóminum og førdur inn í dýrdarinnar frælsi, tað sum hoyrir Guds børnum til. Sí Róm. 8,19-23.

Billy Graham segði fyri nøkrum árum síðani: „Um tú ein dag hoyrir, at eg eri deyður, trúgv tí ikki - eg eri meira livandi tá enn nakrantíð. Eg havi bara skift bústað!“

Himmalin er málið fyri trúgv okkara. Gævi vit fáa mong við okkum til okkara æviga heim!

*Sten Sørensen.*
*Effie Campbell* umsetti.

# Andaligur heilsukostur

Vit liva í eini eitraðari verð, sum er rótin til nógvar sjúkur. Vandamikil kemikaliir og onnur eiturevni í luft og vatni, umframt slíkt, sum verður sprænt á matplantur at verja tær, fáa vit niður í okkum, og gerst hetta rótin til mangar sjúkur. Hesi hættisligu evni verða lagrað í okkara likami, og seinni kunnu tey føra til álvarsligar sjúkur og plágur av ymsum slagi. Harumframt verða vit støðugt ávirkað av skaðiligum strálum gjøgnum luftina.

Fyri at fyribyrgja og fría seg frá hesum sjúkum ræður um at eta sunnan mat, millum annað mat, sum styrkir immunverjuna og aveitrar kroppin. Hetta minkar um vandan fyri sjúkum.

Eru lyftir í Bíbliuni, sum stuðla upp undir tankan um andaliga fyribyrging av sjúkum og líðingum? Tað er við gleði, at eg kann siga: Ja, tað eru lyfti um verju móti sjúkum. Gud sigur í orði sínum: „Tit skulu tæna Harranum, Gudi tykkara, tá vil eg vælsigna breyð títt og vatn og reka allar sóttir (sjúkur) frá tær.“ 2. Mós. 23,25.

Í Sálmunum stendur ein áhugaverd bøn: „Gud mín, tak meg ikki burtur á hálvum aldri!“ Sálm. 102,25 V.D.

Bøn setir Guds verjumekanismu í gongd. Hetta er ein bøn um at sleppa at liva eitt gott og langt lív, ein bøn um ikki at doyggja tíðliga. Her læra vit, at vit ikki skulu taka tað fyri givið, at Gud skal halda sjúkur burtur frá okkum og geva okkum eitt langt lív. Tað er eingin automatikkur í tí. Vit mugu dagliga biðja um, at Guds verjandi kraft skal hava sína ávirkan á okkara lív, soleiðis at vit fáa livað eitt langt og gott lív.

Í Bíbliuni vísir Gud okkum eitt lyfti, sum er til okkara: „Tú skalt slíta fullan aldur.“ 2. Mós. 23,26. Hann vil gera sín part, um vit gera okkara. Hann verjir okkum, tá ið vit ansa eftir okkara heilsu, eta sunt og biðja um andaliga verju. Jesus sigur: „Tí at hvør tann, ið biður, hann fær.“ Matt. 7,8.

Í Faðirvár lærir Jesus okkum, at vit kunnu fyribyrgja og biðja um verju móti sjúkum og óndum upplivingum: „Frels okkum frá tí illa.“ Matt. 6,13.

Tað merkir ikki, at vit frá hesum degi ikki noyðast at hugsa um, hvat ið vit eta, ella hvussu vit liva. Her er tann reglan galdandi, sum sigur, at Gud ger ikki tað, vit sjálv kunnu gera. Men tað, vit ikki kunnu gera, tað kann hann gera, tá ið vit søkja hann av øllum okkara hjarta.

*Svein-Magne Pedersen.*
*Effie Campbell* umsetti.

# Harrin uggar síni

Eg ferðaðist um í Noregi og seldi kristiligan lesnað í uml. 25 ár, og tá hevði eg nógvar góðar upplivingar. – Eg skal her nevna nakað, sum ein góð trúgvandi kona segði mær. Hon hevði leingi trúð á Gud, og hon tók sítt kristna lív í álvara. – Men so kom ein at vitja hana, sum uttan iva var gudloysingur. Hesin gesturin royndi at fáa hana burtur frá tí at trúgva upp á Bíbliuna, og hon fór sanniliga at ivast. Var alt tann beri heilaspuni, bæði hetta við tí æviga lívinum, og at Jesus var Guds sonur? Hetta nívdi hana illa. Er tað kortini ikki so, at tey, sum trúgva á Jesus, eru Guds børn og fara inn til ta ævigu sæluna? – Ja, vissuliga eru tað summi, sum eru meistarar í at sáa iva, men Gud hyggur at hjartanum. Hann sá, at henda konan vildi, at Bíblian var Guds opinbering til okkara.

So hendi tað, at hon skuldi fara til eina jarðarferð. Og tá ið tey stóðu úti á kirkjugarðinum, hoyrdi hon ein undurfagran

sang. Hon gjørdist stórliga bilsin um, at nakar kundi syngja so yndisligt. – Tá ið prestur segði: „Av mold ert tú komin o.s.fr., bleiv sangurin heilt sorgblíður, men tá ið prestur segði: „Úr mold skalt tú aftur standa upp,“ tá broyttist alt í stóra frøi! – Konan hugsaði tá, at hetta verður helst samrøðuevni restina av degnum. Av tí at eingin nevndi hetta, fór hon at spyrja, hvør ið tað var, sum hevði sungið so yndisligt, og hvar ið tey høvdu verið. Men bilsin gjørdist hon, tá ið eingin annar hevði hoyrt nakað.

Eftir at eg hevði hoyrt hana siga frá hesum, mátti eg siga við hana, at hetta var heilt vist okkurt, sum Gud hevði gjørt serliga til hennara, fyri at hon skuldi grundfestast í trúnni á Frelsara okkara Jesus Kristus, og at Bíblian er Guds orð til okkara!

Ja, Harrin uggar síni! Takka og lova honum fyri tað.

*Olav Nerland.*
*Effie Campbell* umsetti.

# Tað smittar

Krím- og influenzavirus eru ikki hitt einasta, sum smittar. Tað gera áskoðanir og hugburðir eisini: „Ringt felag spillir góðar siðir.“ 1. Kor. 15,33. Granskarar kalla tað „kensluborin smitta“, og hon ávirkar øll sjónarmið av lívinum á sama hátt, sum eitt rotið súrepli spillir alla fruktina í skálini. – Ein serfrøðingur sigur: „Ein súrur, grenjutur og neiligur medarbeiðari kann dálka ein heilan bólk og skapa eitt eitrandi arbeiðsumhvørvi. Tú kanst vera sum ein bakteria og gera álop á immunverjuna á arbeiðsplássinum, ella tú kanst vera sum C-vitaminir, sum styrkja tað.

*e.c.* ums.

---

Sum oftast brúka vit ov nógva tíð saman við menniskjum, men ov lítla tíð saman við Gudi.

*e.c.* ums.

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 19. jan. | Tekstur: | 4. – 10. boð, 2 Mós. 20,11-17 | bíbliuorð: | Mark. 12,31 |
| 26. jan. | Tekstur: | 2 Mós. 12,37 + 40;<br>13, 21-22; 14, 1-31 | bíbliuorð: | 2 Mós.<br>14,13b |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74